Grundgeving Ársins Virki 2019 - endaligt

Føroyingum flest dámar væl at goyma. At spara upp. At samla. Vit kenna øll onkran, sum hevur tvær ella tríggjar stórar og rokaðar frystiboksir, tí "tað er gott at hava". Ofta eru tær rokaðar alt árið, og tað tykist, sum tað ongantíð fjarðar í teimum. Uttan tá slaktið hevur verið, og tað er neyðugt at rudda út í frystipizzaum frá 2009, babymos frá 2005, 400 gram av hakkikjøti frá september 2001 og einum posa við onkrum í, sum man ikki veit, hvat er. Tað kann tykjast, sum hesi fólkini trívast best í kulda, tí tú ofta sært tey standa við høvdinum niðri í einari frystiboks, har tey royna at umskipa fyri at fáa meira pláss. Hetta eru ofta tey somu fólkini, sum hava eina garasju, sum er full í gomlum træsprekum og listum, og plankarestum, tí "hvør veit, tað kann jú vera..."

Men at hava eitt lagur, sum er ov stórt, er ikki góður handilsskapur, og kann vera dýrt í longdini. Tí hava vit handlar, heilsølur og goymslur, sum hava eina veruliga lagurstýring. Tað snýr seg um at tryggja, at vøra er tøk til kundan, men at tað hinvegin heldur ikki er so ríkiligt, at ov nógv má fara vekk. Antin tí tað spillist, ella tí mótalitirnir eru øðrvísi enn teir vóru síðsta ár.

At reka ein handil, kann vera torført til tíðir. Kappingin er hørð, og um tú ikki alla tíðina er frammi í skónum, er tað skjótt at onkur annar hevur latið ein handil upp, sum selur júst tað sama, sum tú. At klára seg væl í handilsvinnuni er tí ikki øllum beskorið. Tað krevur hart arbeiði, og framhaldandi menning av vøruúrvali, starvsfólki og marknaðarføring.

Ársins Virki 2019 er eitt av hesum handilsvirkjum, sum hevur haft ein tryggan grundrakstur av felagnum, men sum eisini hevur havt eitt vakið eyga við nýggjum møguleikum at breiðka virksemið og vøruúrvalið. Fyritøkan byrjaði sítt virksemi við køli- og frystivørum í einari tíð, tá úrvalið av feskum og frystum vørum í Føroyum var rættiliga avmarkað. Hugskotið handan felagið var at bjóða brúkarunum í Føroyum eina dygdarvøru, og samstundis eitt munandi størri vøruúrval at velja í.

Síðani er virksemið ment, so fyritøkan í dag hevur eitt breitt vøruúrval innan bæði frystar og feskar matvørur, non-food og ymiskar tænastur. Fyritøkan byrjaði sum nógvar aðrar fyritøkur í kjallaranum í húsinum hjá stovnaranum, men plássið gjørdist ov lítið fyri nógvum árum síðani, og í dag er fyritøkan ein av teimum stóru innan sína vinnugrein. Bilarnir hjá fyritøkuni eru í dag ein eyðkend sjón á veganetinum, tá fyritøkan skal veita vørur til kundar kring landið.

Fyritøkan stovnaði í 2009 eitt dótturfelag, sum veitir professionellar reingerðartænastur, fyrst og fremst til vinnufyritøkur og stovnar, og er í dag størsta felag í Føroyum innan sína vinnugrein. Eftir eitt langt áramál við góðum samstarvi, keypti Ársins Virki í 2014 eina fyritøku, sum í nógv ár hevur framleitt siðbundnan viðskera til heimamarknaðin. Nýggjasta skotið á stammuni er ein tænasta, har tað ber til at leiga útgerð til ymiskar veitslur og hátíðarhald.

Ársins Virki 2019 er ein stórur arbeiðsgevari, og hevur eisini nógvar tilflytarar í starvi. Fyritøkan hevur lagt stóran dent á at fáa starvsfólkini at føla seg væl í fyritøkuni og í føroyska samfelagnum, og hevur bjóðað fram skeið í føroyskum og føroyskum samfelagsviðurskiftum til síni starvsfólk, longu áðrenn nøkur almenn tilboð til tilflytarar vóru.

Dómsnevndin hevur eisini lagt dent á, at fyritøkan seinastu árini hevur haft eina stødugt hækkandi sølu, og samstundis hækkandi vinningsføri. Hetta hevur haft við sær, at úrslitið á botnlinjuni og

eginpeningsavkastið somuleiðis er hækkað hesi seinnu árini. Samanumtikið hava búskaparligu úrslitini og lyklatølini verið góð í einari vinnugrein við harðari kapping. Leggjast kann afturat, at í 45 ára longu søgu felagsins hevur felagið øll árini haft yvirskot.

Við støði í búskaparligu gongdini í fyritøkuni, við menningini av nýggjum virkisøkjum, og við tí sosialu ábyrgdini, sum fyritøkan hevur sýnt í verki, er dómsnevndin tí samd um at velja P/F Poul Michelsen sum Ársins Virki 2019.